ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

VÍF vann og H71 kom í finaluna…

Vestmenningar vunnu umspælda útidystin ímóti Neistanum í gjárkvøldið, og samstundis gjørdist greitt, at tað verða VÍF og H71, sum skulu spæla FM-finalurnar hjá monnum

Vestmenningar vunnu á Neistanum í gjárkvøldið, tá dysturin frá 18. januar var spældur umaftur
Mynd: Álvur Haraldsen

HONDBÓLTUR
Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Skuldi Neistin hava nakran møguleika at koma í FM-finaluna, var í øllum førum neyðugt við sigri á VÍF í gjárkvøldið, umframt at annað eisini skuldi ganga upp í eina hægri eind. Men ikki bar til hjá Neistanum, sum hesa ferð tapti við tveimum málum ímóti VÍF, sum tapti við einum máli, tá dysturin var spældur fyrru ferð.

Tá VÍF at enda hevði vunnið málríka og umspælda dystin á Hálsi í gjárkvøldið við 36 málum ímóti 34, vóru tey allarfegnastu tey í Hoyvík, tí úrslitið merkti, at H71 nú við vissu hevur ognað sær sess í FM-finalunum, sum verða spældar ímóti VÍF.

Hevði Neistin vunnið, hevði tað verið eitt krav til H71, at sigur fekst burtur úr dystinum á Skála um vikuskiftið, men nú sleppa hoyvíkingar undan at hugsa um tað. Nú skulu teir bara fyrireika seg til finaludystirnar.

Dysturin, sum var spældur umaftur í gjárkvøldið, var upprunaliga spældur 18. januar, tá Neistin vann. Men eftir at eitt mál var tikið frá vestmenningum í hálvleikssteðginum, kærdu teir og fingu viðhald í fyrst kappingarnevndini, síðani dómsnevndini og at enda eisini ítróttardómstólinum, at dysturin skuldi spælast umaftur.

At Neistin sostatt snávaði og ikki kemur í finalurnar, merkir somuleiðis, at føroyameistaraheitið hjá teimum bláu frá í fjør ikki verður endurtikið. Tó hevur Neistin í ár vunnið steypakappingina, so heilt galið hevur árið tó ikki verið.

Fyri VÍF merkti sigurin í gjárkvøldið, at liðið vinnur landskappingina og tí fær heimadyst í einum møguliga triðja finaludysti ímóti H71.

FAKTA um dystin

Neistin-VÍF 24-36 (16-16)
10 min: 5-7
20 min: 11-8
40 min: 23-22
50 min: 27-28
Málskjúttar
Neistin: Karl Herup Olsen 7, David Edvardsen 5, Jugoslav Djumic 5, Finnur Hansson 4, Áki Mørk 4, Jens Mohr 3, Jón Ludvig 2, Birgir Poulsen 2, Ingi Olsen 2 (1)
VÍF: Áki Olsen 11, Sámal Joensen 11 (3), John Andreasen 5, Agnar Joensen 4, Joen Høgnesen 2, Áki G. Olsen 2, Bjarti Hansen 1
Brotskøst: Neistin 1, VÍF 3
Útvísingar: Neistin 2, VÍF 1
Dómarar: Andreas Hansen & Eyðun Samuelsen

Neistin kærir umaftur – men onki hald er í

Á botninum á dómaraseðlinum stendur, sum viðmerking, at »Neistin ger vart við, at Áki G. Olsen hevur karantenu«, men hetta kemur ikki at hava nakra ávirkan, tí Neistin hevur mistikið seg.


Viðmerkingar: Neistin ger vart við at Áki G Olsen hevur karantenu.

Tað teir, eftir øllum at døma, royna at halda seg til, er, at Áki G. Olsen skuldi havt leikbann, tá upprunaligi dysturin 18. januar varð spældur millum Neistan og VÍF.

Hetta er ikki rætt, tí tá spældi Áki G. Olsen og fekk enntá seks mál.

Hevði tað verið, at hann hevði leikbann til upprunadystin, so kundi tað heldur ikki ávirka henda dystin, tí sambært reglunum skuldi hann sitið yvir í fyrsta dystinum eftir úrskurðin hjá ítróttardómstólinum.

Hinvegin var Áki G. Olsen leikbannaður 4. januar, tá Neistin og VÍF eisini spældu, men tá spældi hann ikki, og tað er eftir øllum at døma hetta, Neistin hevur blandað við.

So nú. Langt um leingi er dysturin, sum hevur verið í øllum instansum í ítróttini avgreiddur.

Gongdin í málinum var, at fyrst kærdi VÍF til kappingarnevndina og fekk við hald. Síðani hevur Neistin bæði kært til dómsnevnd og ítróttardómstól, og í báðum førum endaði við, at Neistin tapti.

Upprunadystin vann Neistin við einum máli, men í gjár dró VÍF longra stráið.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Inga Olsen, venjara hjá Neistanum.

-eij

Pál svimur sjálvandi ikki fyri Danmark

At Pál Joensen fór at gevast at svimja fyri Føroyar og í staðin skuldi svimja fyri Danmark, var ein aprílsøga, sum sjálvt drivin fólk í føroyska svimjiheiminum trúðu uppá

SVIMJING
Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Í Sosialinum í gjár, 1. apríl, var ein søga á ítróttarsíðunum og eisini á forsíðuni, at nú fór Pál Joensen at velja danska svimjilandsliðið fram um tað føroyska, tí tað var einasti møguleiki, skuldi hann menna seg sum svimjari, umframt at hann annars ikki fekk síni met roknað sum donsk met.

Men hetta var sjálvandi ein aprílsøga, uttan nakað sum helst hald í veruleikanum. Sjálvandi fer Pál Joensen ikki at svimja fyri Danmark, hóast grundgevingarnar óivað tóktust trúligar, tá havt verður í huga, at Sosialurin týsdagin hevði gjørt nógv burturúr, at øll tey donsku juniormetini hjá Pál Joensen skuldu strikast.

Tað ljóðaði jú næstan sum ein aprílsøga, at danska svimjisambandið hereftir fór at krevja, at føroyskir og grønlendskir svimjarar skuldu umboða Danmark, og ikki Føroyar ella Grønland, skuldu teir fáa síni met skrásett sum donsk met. Men tað var eingin aprílsøga, men veruleiki.

Eitt passaði tó

Bæði Pál Joensen og venjari hansara, Jón Bjarnason, fingu tað nógva av degnum hópin av

Argjum og Víkingur-B68/NSÍ í Gøtu.

Pál Joensen velur danska landsliðið

– Skal eg rokka mínum málum, eru umstoðurnar fyri viðari menning ikki til staðar í Føroyum. Tí eri eg noyddur at taka av tilboðnum um at svimja fyri Danmark,

Pál Joensen tær treyir, danska svimjisambandið hevur sett, um hansara met skulu verða góðkend sum donsk met. Pál hevur nevnligá tikið eina tunga, men leingi umhugsaða avgerð. Hann fer nú at umboða Danmark í aljóða kappingum og svimja á danska

Myndin til aprílsøguna í gjár var tikin í Vági í fyrramorgunin, tá Pál Joensen vandi, og vit kunnu leggja aftrat, at donsku landsliðshúgvuna eigur Pál ikki sjálvur
Mynd: Jón Bjarnason

viðmerkingum um søguna, og mestsum í hvørjum einasta føri noyddust teir at vísa fólki á, at talan var altso um eina aprílsøgu.

Ábendingin um, at so var, var fjald í teldupostadressuni undir navninum á greinaskrivaranum, tí har stóð fyrsti@apríl.fo. Men tann reglan verður neyvan serliga ofta lisin, og í gjár vóru tað í øllum førum mong, ið ikki góvu henni gætur.

– Hetta hevur verið ótrúliga stuttligt, og her hava verið nógvar reaktiónir. Tað stuttligasta er, at tað hava verið fólk innan fyri svimjiheimin, sum hava verið við leingi og enntá finnast á hægstu rók, ið hava ringt og kært sína neyð, sigur Jón Bjarnason, sum hevði eina reyðgløðandi telefon tað nógva av degnum.

– Onkur segði tað fara kalt niður eftir rygginum á sær, onkur hevði fingið andaneyð og onkur tosaði um tár í eygnakrókunum. Uppaftur onkur annar royndi at binda um heilan fingur og segði seg ringja fyri at tryggja sær, at hetta altso bara var ein aprílsøga.

Kortini var alt ikki tann bera aprílsøga, tí Pál Joensen vil fegin undirstrika, at hann veruliga er vónbrotin av politikarunum, at teir ikki hava verið førir fyri at útvegað bara so mikið sum ein hyl í landinum, sum er 50 metrar langur. Honum hava svimjararnir bíðað leingi eftir, og tann parturin av aprílsøguni má gjarna takast í fullum álvara!